# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

*- Vit hava søkt FSF um at víkja frá reglunum, tí vit meta hetta sum serligt føri*

*Evin H. Jacobsen, formaður í 07 Vestur*

# Tór-Ingar er enn hjá HB

**Hóast tað longu í fjør heyst varð almannakunngjørt, at Tór-Ingar Akselsen skal spæla í Vágum í 2008, so liggur spæliloyvið enn í HB**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Evstamark fyri spælaraflytingum millum føroysk fótbóltsfeløg var fríggjakvøldið. Ein av spælarunum, sum fyri langari tíð síðani boðaði frá, at hann fór at skifta felag, er Tór-Ingar Akselsen, sum hevur gjørt av at leita aftur til røturnar í Vágum.

## Gloymdu spælaraloyvið

Tá avtalan varð gjørd, varð sagt, at Tór-Ingar skuldi spæla í FSV 04, sum felagið æt í fjør. Men síðani er tann broyting farin fram, at tað nú er 07 Vestur, sum er nýggja felagsliðið. Og í umskipanini av hesum tykist spæliloyvið hjá Tór-Ingari at vera gloymt.

- Vit mugu bara blankt viðganga, at eitt stórt mistak er framt frá okkara síðu, sigur Evin H. Jacobsen, sum er formaður í 07 Vestur.

- Í nýggja felagnum hava vit hildið, at øll viðurskifti við Tór-Ingar vóru avgreidd, og í FSV 04 hava tey hildu, at vit hava avgreitt málið. Og tí stendur navnið hjá spælaranum enn skrásett hjá HB í spælarayvirlitinum hjá FSF.

Heilt vónleys er støðan hjá 07 Vestur tó ikki. Reglurnar fyri spælaraskiftum loyva frávikum undir heilt serligum umstøðum, og í felagnum vóna tey, at umstøðurnar hesa ferð eru nóg serligar.

- Vit hava í øllum førum ein spælarasáttmála, sum er góðkendur av FSF, og tí hevur eingin sum helst ivi verið um, hvar spælarin skuldi spæla. At vit so hava framt ein umsitinarligan brølara, mugu vit blankt viðganga, men vit hava so søkt FSF um at víkja frá reglunum, tí vit meta hetta sum heilt serligt føri, sigur Eivin.

*Í standard spælarasáttmálanum, sum FSF hevur heitt á spælarar og feløg um at brúka, stendur í fyrstu greinini, at spælarin bindur seg at spæla fyri felagið, sum skrivað verður undir saman við. Prinsipielli spurningurin í hesum førinum er helst, um ein FSF-góðkenning av sáttmálanum tá eisini merkir, at spælarin bert hevur loyvi at spæla fyri júst hetta felagið*




Stjørnan-Neistin 34-22 (19-12):

# Stjørnan bara nógv best

**Neistin fekk ikki eitt bein til jørðina, tá tær vitjaðu í Klaksvík týskvøldið**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tað ber illa til at siga, at spælt varð bara upp á eitt mál í einum hondbóltsdysti. Men vendingin er ikki heilt veruleikafjarð, tá Stjørnan vindur seg upp.

Tað gjørdu meistararnir týskvøldið, tá Neistin vitjaði, og úrslitið varð eisini hareftir.

Snøgt sagt, so fekk Neistin ikki eitt bein til jørðina fyrstu løtuna, og longu eftir fyrsta korterið stóð greitt, at stigini undir øllum umstøðum vórðu verandi í Klaksvík.

Tá munurin fyrstu lítlu løtuna longu nærkaðist teimum 10 málunum, varð ferðin tikin nakað av spælinum, og Neistin kom alt meira við í dystin. Men spennandi gjørdist tað ongantíð.

Við sigrinum undirstrikaði Stjørnan, at tær enn skulu roknast sum nógv tað sterkasta kvinnuliðið í landinum. Neistin man hinvegin í verandi løtu leggja størri orku í at vinna allar aðrar dystir enn júst tann móti Stjørnuni. Gera tær bláu tað, so eru tær vísar í einum plássi í FM-finaluni, har Stjørnan aftur verður móstøðuliðið.

## FAKTA

**Stjørnan-Neistin 34-22 (19-12)**
10 min: 7-1
20 min: 13-6
40 min: 26-16
50 min: 31-17

**Málskjúttar**
**Stjørnan**: Simona Petersen 11(3), Durita Christophersen 9, Joan M. Djordjevic 5, Anna Kristina Samson 3, Durita Mikkelsen 2, Maria við Neyst 2, Durita Ljósstein 1, Bára S. Klakstein 1
**Neistin**: Elin Staksund 7, Ása á Neystabø 5, Rakul Augustinussen 3(1), Anja Heinadóttir 2, Ása Christiansen 1, Nicoleta R. Hansen 1, Unn J. Kragesteen 1, Edith Dahl Olesen 1
**Brotskøst**: Stjørnan 3, Neistin 2
**Útvísingar**: Stjørnan 3, Neistin 5
**Dómarar**: Sámal Paulason & Kári Hansen